Munnligur fyrispurningur
eftir § 52 í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Stýrið í Bústøðum

Spurningar:

1. Hvat var tilmælið hjá umsitingini í Almannamálaráðnum um valið av stýrinum í Bústøðum?
2. Tók umsitingin í Almannamálaráðnum fyrivarni, ella hevði umsitingin viðmerkingar í aðramáta í mun til valið av stýrislimum í Bústøðum?
3. Hvørja støðu tók landsstýrismaðurin eftir tilmælið og/ella viðmerkingarnar hjá umsitingini?

Viðmerkingar:
Nýtt stýri er valt í Bústøðum. Komið er fram í miðlunum, at ein av nýggju limunum hevur kært Bústaðir, og at Almannamálaráðið skal viðgera hesa kæruna. Tí verður hesin fyrispuringur settur.

Á Løgtingi, 10. mai 2021

Beinta Løwe Jacobsen